Eysturkommuna

Mál til viðgerðar: 22/00347 28/22 Samtykt Byggi - og býarskipanarnevnd, 22.09.2022 Serstøk byggisamtykt fyri sethúsaøki í Fløtugerði í Leirvík

Málsviðgeri: Unn Sørinardóttir Perdomo

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.10.2022 | 31/22 | 22/00347-6 |
| 2 Býráðið | 27.10.2022 | 50/22 | 22/00347-6 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 25.10.2022 | 33/22 | 22/00347-6 |

# 28/22 SAMTYKT BYGGI - OG BÝARSKIPANARNEVND, 22.09.2022 SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI SETHÚSAØKI Í FLØTUGERÐI Í LEIRVÍK

**Málslýsing:**

Serstøk byggisamtykt er gjørd fyri útstykkingin í Fløtugerði í Leirvík. Útstykkingin liggur í einum B2 økið. Umsitingin hevur arbeitt við at gera eina serstaka byggisamtykt, ið hóskar til útstykkingina.
Í stuttum, so inniheldur serstaka byggisamtyktin hæddarviðurskifti, frástøðu til mark (byggilinjur) v.m. Víst verður til skjøl í málinum.

**Ískoyti:**
Serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri nýggju útstykkingina í Fløtugerði í Leirvík, sí skjøl í málinum.

**Ískoyti:**
Punkt 4.2 í serstøku byggisamtyktini er broytt til soljóðandi:

- Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt sethús, sum eisini kann hava eina minni íbúð.

Punkt 4.3 Mest loyvdu hæddir, er broytt til soljóðandi:

| |
|---|
| • Hús omanfyri vegin við einari hædd og lofti, skal hallið á takhæddini ikki vera meira enn 45 stig og hæddin 8,25 m frá planeringshæddini og upp til húsamønina, sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at samtykkja serstøku byggisamtykt fyri økið í Fløtugerði í Leirvík |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. september 2022**
Málið tikið av skrá

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. oktober 2022**
Málið tikið av skrá

**Byggi - og býarskipanarnevnd 25. oktober 2022**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við umsitngini, við hesi viðmerking:

Punkt 4.3 Niðanfyri vegin
Hús niðanfyri veg kunnu byggjast við einari hædd, yvir vegkotu og kjallara niðanfyri vegkotu. Hesi kunnu ikki byggjast við høgari mønureising. samb. Kortskjali 2.

**Býráðið 27. oktober 2022**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi - býarskipanarnevndini